Minningarorð um

# Vilborg Vestergaard

Tað er ómetaliga kensluborið at seta meg at skriva minningarorð um mína góðu vinkonu Vilborg.

Orðatakið sigur: „Skænk mig en blomst men jeg lever.... „, og tað haldi eg eisini, at vit hava gjørt ígjøgnum lívið – Vilborg og eg.

Okkara vinarlag hevur verið av tí góða gamla slagnum, og tí vóru boðini 1. páskadag sera tung, at tú ikki var ímillum okkum meir. Hóast eg visti, at tú ikki hevði langa tíð eftir, hevði eg ikki væntað, at tað skuldi vera so skjótt. Men tey góðu minnini goymi eg í hjarta mínum bæði í sorg og gleði.

Góða Vilborg, eg sigi tær takk fyri alt tað, vit høvdu saman, og vit síggjast aftur einaferð.

Eg vil gjarna geva eitt dømi um, hvussu gott menniskja tú vart: Tú arbeiddi í tveimum heimum her í bygdini. Tey goldu sjálvi fyri hjálpina og vóru sera glað fyri at hava teg til arbeidis. Síðan kom heimahjálparskipanin í lag, og tá blivu tey biðin um at søkja um at fáa heimahjálp, tí tað var ókeypis. Tey blivu øðiliga ørkymlaði um hetta og søgdu nei, tí tey vóru bangin fyri, at tú ikki longur kundi arbeida har. Men tú bleiv biðin um at søkja og fekk tað. Tey vóru tí glað, tá váttað varð, at tey kundu „behalda“ teg. Tað vísir, hvat og hvussu tú hevur verið.

Vit báðar arbeiddu saman í 13-14 ár, og vísti tú kærleika, umsorgan allastaðni har tú vart.

So skal eg biðja Gud um at styrkja tíni kæru í sorgini - Steinbjørn, Helena, Sonni og børnini, og systrarnar við familju.

Við hesi yrking vil eg lýsa frið yvir mína kæru vinkonu Vilborg.

**Jonhild**

### Deyðin er ikki tað seinasta

*Deyðin er ikki tað seinasta, eg eri bara farin um sýnina.*
*Eg eri eg, og tú ert tú. Tað sum vit áður vóru fyri hvør øðrum, tað eru vit enn.*
*Nevn meg at navni, nýt mítt yndisnavn, práta við meg um leyst og fast, sum vit altíð gjørdu.*
*Lat røddina vera hina somu, hóast sorg og sakn.*
*Flenn, soleiðis sum vit vóru von at flenna saman at onkrum skemtiligum.*
*Hugna tær, brosa, hugsa um meg, bið fyri mær.*
*Lat navn mítt framvegis hoyra upp í tínum tonkum og práti.*
*Tala um meg náttúrliga, ikki við gráturødd.*
*Lívið er framvegis dýrabart: Tað er eins og tad altíð var; tað heldur fram øld eftir øld.*
*Deyði og lív hoyra saman.*
*Hví skuldi eg farið úr huga, um eg fór úr eygsjón?*
*Eg bíði bara eftir tær, um eina stund, onkustaðni her í nánd, aftanfyri sýnina.*
*Alt er, sum tað eigur at vera.*



*Vilborg var ein virkin talskvinna fyri sjófólkið. Hon var í mong ár virkin í sjómannadeildini hjá fiskimannafelagnum. Óli Jacobsen hevði nógv samstarv við Vilborg og metir seg eisini at hava mist ein góðan vin. Tey høvdu samband millum sín heilt til tað síðsta. Her verður sáttmálin undirskrivaður í 2006. Frá vinstru eru Eyðstein Djurhuus fyri Skipara- og Navigatørfelagið, Jógvan Nybo fyri Maskinmeistarafelagið, Hákun Djurhuus fyri reiðarafelagið fyri farmaskip og Vilborg fyri sjómannadeildina*

S & K:

# Krevja MVG burtur av heilsugóðum matvørum

**Av tí at flest allar gerandisvørur hækka í prísi, kemur meira og meira mvg inn í landskassan. Hetta heldur S & K felagið eigur at koma løntakarunum til góðar**

FAKFELAG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

So hvørt tað verður dýrari at keypa inn, verður trístið á lønarlagið hægri. Tí skil hava longu verið fleiri krøv frá ymsum fakfeløgum um at hækka lønirnar - tí prísir á gerandisvørum eru hækkaðir.

- Tað er vælskiljandi, tí tann lønarhækkan, sum lønmóttakarin fekk við seinastu lønarsamráðingarnar, standa ikki mát við hækkaðu prísirnar á gerðandisvørur, sigur Pætur Niclasen, formaður í S & K felagnum.

Hann sigur, at mótsøgnin í hesum er, at meðan reallønin hjá tí vanliga lønmóttakaranum minkar meira og meira, fær landskassin meira og meira inn av MVG inntøkunum, vegna teir hækkandi prísirnar á gerandisvørunum.

Tað hevið gjørt nógv størri mun hjá lønmóttakaranum, um MVG bleiv sett niður og møguliga avtikið av ymiskum vørum, so sum mjólk, frukt, grønmeti og breyðið.

- Tilmælið hjá S & K felagnum í hesum málið er at MVG verður sett niður á nøkrum neyðsinja vørum, so sum rugbreyðið, blæum umframt vistfrøðiligum vørum, og at MVG verður avtikið heilt av heilsugóðum vørum, so sum mjólk, frukt og grønmeti, sigur Pætur Niclasen, formaður í S & K felagnum.



*Pætur Niclasen, formaður í S & K felagnum*